# Barr v/ barrvørum til leigu

**Restorff's bryggjarí hevði fyri umleið einum ári síðani eitt tilboð, har til bar at leiga eitt fatølsanlegg, eina lítla barr og barrgentur til ymisk tiltøk. Hetta tilboðið datt tó mestsum niðurfyri, tá ið Vertshúsið læt upp, men nú er ætlanin at byrja aftur, hesuferð í størri mun enn áður**

RESTORFF'S
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

Stjórarnir á Restorff's Bryggjaríi nevna hesa nýggju skeinkingartænastuna fyri Restorff's VIP.

– Restorff's VIP tænastan er eitt tilboð til fólk, um at lata okkara Restorff's gentur og dreingir standa fyri allari skeinking, tá brúdleyp, veitslur og móttøkur eru, greiðir Johan Mortensen frá.

Hann sigur, at við í prísinum fyri Restorff's VIP er alt keyp av spiritussi, arrangering av barrini, rudding av gløsum so hvørt og so framvegis.

Eisini verður møguleiki at spyrja um ráð til hvat slag av víni skal havast afturvið matinum, hvussu nógv av sterkum skal keypast, hvør vælkomstdrykkur er hóskandi og annað.

– Eg haldi, at hetta tilboðið veruliga er nakað, sum manglar her í landinum. Tað vísir seg nevniliga ofta, at fólk koma í neyð, tá tey skulu skipa fyri eini veitslu, tí tey vita ikki hvussu stórar nøgdir tey skulu keypa, hvørji sløg barrin skal kunna bjóða og so framvegis, sigur Johan.

Hetta við at leiga barrgentur út, er ikki nakað nýtt, hóast tað ikki er serliga vælkent her heima í Føroyum. Tey flestu av teimum størru útlendsku bryggjaríunum hava tað, tey nevna øl gentur, ið kunnu leigast út til at skeinkja í ymiskum veitslum.

Barrfólkið hjá Restorff's hevur longu verið rættiliga nógv úti um seg, bæði til konsertir, brúdleyp, polterabend og móttøkur, og tað hevur víst seg at verið sera væleydnað.

Jóhan sigur seg eisini merkja, at áhugin fyri Restorff's VIP er sera stórur.

### Ølsmakking

Sum nakað nýtt ætla teir eisini at skipa fyri einum ølsmakkingarkvøldi í kjallaranum í Vertshúsinum.

– Ja, tað skal vera akkurát sum í útlondunum, har tú kanst drekka eina størri mongd av øli fyri eina ávísa upphædd, innanfyri eina ávísa tíð, greiðir Johan frá.

Hann sigur tað tó vera sera striltið at skipa fyri nøkrum nýggjum í Føroyum.

– Vit hava ikki loyvi at lýsa við nøkrum av tí, vit gera. So tað er ógvuliga tungt at royna at fáa okkurt nýtt upp at koyra, sigur hann at enda.

Sum skilst fer ølsmakkingin av bakkastokki nú fríggjakvøldið.

Ráfiskaseljarafelagið:

# Eykaaðalfundur um uppboðssølu

**- Vit samtyktu á aðalfundi í desember seinasta ár at fara upp í hesa tilgongdina, sum hevði til endamáls at broyta Fiskamarknaðin Føroya. Skulu vit sum felag taka okkum burtur úr aftur hesum arbeiði, má ein nýggjur fundur samtykkja hetta, sigur Árni Joensen, formaður í Ráfiskaseljarafelagnum**

EYKAAÐALFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*- Tá ið Ráfiskakeyparafelagið førir fram, at Ráfiskaseljarafelagið er lopið frá eini semju, er hetta ikki rætt. Vit høvdu eina semju um at fara upp í Fiskamarknaðin, men tað merkir ikki, at samráðingarnar um øll viðurskifti vóru lidnar, sigur Árni Joensen, formaður í Ráfiskaseljarafelagnum*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Á eykaaðalfundi klokkan 10 í morgun fer Ráfiskaseljarafelagið at tosa um støðuna, nú semja ikki er í felagnum um nýggju uppboðssøluna, sum ætlanin hevur verið at stovnað saman við Ráfiskakeyparafelagnum og Fiskamarknaði Føroya.

Lagt hevur verið upp til, at Fiskamarknaður Føroya skal eiga helvtina av nýggju uppboðssøluni, og Ráfiskakeyparafelagið og Ráfiskaseljarafelagið hina helvtina.

Ein minni nevnd hevur vegna partarnar í málinum arbeitt saman við advokati um, hvussu nýggi bygnaðurin skal síggja út, og feløgini hava hvør í sínum lagi kunnað sítt bakland um gongdina so hvørt, sum málið hevur tikið skap.

Nú tað leið móti endanum, og feløgini skuldu kunnað sítt bakland um úrslitið, var ikki semja í Ráfiskaseljarafelagnum um at verða við longur.

### Virða støðuna

Árni Joensen, sum er formaður í felagnum, hevur ikki hug at fara út í smálutir við, hvat skilti partarnar nú móti endanum.

– Eg haldi ikki, at tað hevði verið rætt av mær mótvegis einstøku limafeløgunum at útgreina tey mál, sum semja ikki er um.

Hann sigur, at tá ið Ráfiskakeyparafelagið hevur ført fram, at Ráfiskaseljarafelagið er lopið frá eini semju, er hetta ikki rætt.

– Tað er rætt, at ráfiskakeyparar og ráfiskaseljarar høvdu eina semju um at fara upp í Fiskamarknaðin, men tað merkir ikki, at samráðingarnar um ymisku viðurskiftini vóru lidnar. Tað var her, vit ikki náddu á mál, nú tað leið móti endanum, og vit noyðast at virða støðuna hjá limafeløgunum.

Árni sigur, at hóast stígur kom í ætlanina at stovna eina nýggja uppboðssølu saman við nevndu feløgum, stendur Ráfiskaseljarafelagið, sum hevur seks limafeløg, framvegis saman sum felag.

Limafeløgini í Ráfiskaseljarafelagnum eru: Felagið Trolabátar, Meginfelag Útróðrarmanna, Felagið Línuskip, Felagið Trolskip, Felagið Lemmatrolarar (djúpvatnstrolarar) og Felagið Garnaskip.

### Nýggj samtykt

Árni sigur, at eykaaðalfundurin í dag verður ikki so ógvuliga formligur.

– Men vit fara at viðgera støðuna, soleiðis sum hon er, og væntandi fara vit eisini at atkvøða um hetta málið einaferð aftrat.

Hann vísir á, at Ráfiskaseljarafelagið á aðalfundi í desember seinasta ár samtykti at fara upp í hesa tilgongdina.

– Er støðan hjá felagnum ein onnur í dag, og vit ikki kunnu semjast um at verða við, mugu vit broyta hesa samtyktina, sigur Árni Joensen, sum í gjár ikki dugdi at meta um, hvat úrslit eykaaðalfundurin í dag kemur til.

# Bretski fiskimálaráðharrin vitjar

**Í Føroyum fer Ben Bradshaw at kunna seg um, hvussu fiskiskapurin kring Føroyar er skipaður við eitt nú fiskidøgum heldur enn kvotum**

VITJAN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í morgun verður Jóannes Ejdesgaard, løgmaður, vertur við ein hátíðarligan morgunmat í Tinganesi. Gesturin er ikki hvør sum helst. Tað verður nevniliga bretski fiskimálaráðharrin, Ben Bradshaw, sum sessast saman við løgmanni.

Eftir morgunmatin og nakað út á fyrrapartin verður farið úr Havn við Brimli til Klaksvíkar. Umborð á Brimli verður fundur millum starvsbrøðurnar úr Bretlandi og Føroyum, Ben og Bjørn. Hesin fundur fer í høvuðsheitum at snúgva seg um, hvussu fiskiskapurin kring Føroyar er skipaður, eitt nú við fiskidøgum heldur enn kvotum.

Útlendingar hava víst føroysku fiskidagaskip-anini stóran áhuga. Hildið verður, at hetta er ein skilagóð skipan, og ikki minst tí er tað spell, at vánalig umsiting er við at eta hana upp – innanífrá.

Tá ið Brimil kemur til Klaksvíkar í dag, verður vitjað á Kósini og hjá JFK-Trol, har kunnað verður um virksemið.

Heldur ikki í Klaksvík fer Ben Bradshaw at ganga við svangan munn, tí borgarstjórin, Steinbjørn Jacobsen, verður vertur við eina máltíð í býráðshøllini.

Tá ið bitin er etin, fær bretski fiskimálaráðharrin høvi at hitta umboð fyri føroyska fiskivinnu, og longu klokkan 15.15 verður tíðindafundur, har Ben og Bjørn verða við.

Eftir fundin gongur leiðin aftur til Havnar við Brimli, og á ferðini suður fer Bogi Hansen at greiða frá um veðurlagsbroytingar í Norðurhøvum.

Í kvøld verður Bjørn Kalsø, landsstýrismaður, vertur fyri einum døgurða í Listaskálanum.

# Radio heldur enn radarsignal

**Flogferðslan í Vágum verður stýrd av radiosignalum og ikki radarsignalum, sum skrivað varð í blaðnum fyrr í vikuni, sigur flogvallarovastin**

FLOGFERÐSLA

Í blaðnum fyrr í vikuni varð grein um Hotel Vágar, har sagt varð, at teknikkurin á flogvøllinum forðar fyri ætlaðari útbygging av hotellinum.

Roynt varð tá at fáa viðmerking frá flogvallarovastanum, men tað eydnaðist ikki tá. Seinni hevur Finnbogi Niclasen, flogvallarovasti, gjørt var við, at talan er ikki um radarsignal, sum skrivað varð, men radiosignal, sum flogvøllurin brúkar til innflúgvingina.

Sendar verða radiobylgjur fyri at fáa eina heilt neyva kós undir fráferð og lending.

Finnbogi Niclasen sigur, at flogvøllurin hevur ta nýggjastu útgerðina, sum finst á marknaðinum til endamálið. Útgerðin er tann sama, sum stóru lufthavnirnar aðrastðani eisini brúka, sigur hann.

Hotel Vagar varð í síni tið bygt eftir teimum treytum, sum flogferðslumyndugleikarnir settu bygningum, sum standa so nær flogvøllinum, og tær treytirnar eru framvegis galdandi í dag, sigur Finnbogi Niclasen. Tískil er tað ikki flogvøllurin, sum forðar fyi ætlaðu byggingini. Í treytunum er millum annað nevnt um tilfar og hædd á bygninginum, tí hotellið stendur framman fyri tólið, sum sendir signal yvir Sørvágsfjørð.

**ej**



# 200 og 48 Pages í Vertshúskjallaranum





*Teir báðir beiggjarnir, Niels og Frants, koyrdu báðir við fullari ferð*

**»And the Crowd went Crazy« Sitat frá Tommy av Pete Townsend. 48 Pages hitaðu uppundir grýtunum, tó 200 vóru høvuðsnavnið**

UMMÆLI
*Orð og myndir:*
*Karl Anton Klein.*

Tað var heilt klárt at 48 pages ikki bara vóru har fyri at hita upp,men at teir hildu seg eiga ein stóran part av skránni.Og rætt høvdu teir, tí ikki kann sigast annað enn at 48 pages seinasta árið hava verið sum ein rakket á rokkpalli Føroya.Frá í 2003 at hava vunnið Pop Top og harvið sum "underdogs" sluppu at spæla á ólavsøkukonsertini (Tó undir øðrum navni, tí undirlutafelagið hevði tikið feil av vinnaranavninum) til hetta kvøldið í kjallaranum er bæði bólkur, manning og framtraðkan verið fyri stórari broyting og eini øgiligari betring. Einki er at ivast í at Íslandstúrurin hjá teimum saman við Speaker í summar, hevur sparkað teir framm soleiðis at teir eru púra klárir yvir hvat skal til fyri at flyta áhoyrarafjøldina.

Tað gjørdu teir so við lít hetta kvøldið.Fyri fyrstu ferð eg havi verið í Vertshúskjallaranum ljóðaði tað væl har niðri. Grundin var sjálvandi at ein stór fjøld av glaðum fjepparum høvdu funnið sær vegin "Underground".

Og fjøldin vildi hava Punk.

Og tað fekk hon so.Eitt so vælspælandi 48 sum ongantíð fyrr, kókaði alt upp so tað longu langt áðrenn høðusnavnið kom upp at spæla, var lív í øllum klútum.

Ringt er at taka nakað serligt lag burtur úr,annað enn at alt svingaði púra vilt og øll flippaðu út til ein ungan bólk sum sanniliga vísti at teir klára at stýra eini feitari konsert.

Stutt sagt eitt pissifeitt upplivilsi sum fekk meg at ivast hvussu 200 mundu fara at klára seg.

### 200

Tá 200 byrjaðu hugsaði eg við mær sjálvum,at nú skuldi Niels taka seg saman um so var at hann ætlaði at yvirganga lítlabeiggjan í 48 pages (átti ikki at verið neyðugt at nevnt Frans við navni,) sum hevði sparkað fjøldina so mikið í gongd at hon kókaði.

Men Niels og hansara menn hava tað til felags,í mun til 48 Pages, at teir hava rutinuna, hava spælt í mong ár, ikki minnst í fyrsta og eftir mínum tykki, einasta føroyska grungebólkinum Mold, sum gjørdi nógv um seg í nítiárunum.

Teirra stóra styrki liggur í at teir hava nøkur góð løg sum kunnu fáa okkum á flog, sjálvt um vit halda vit flúgva. Eitt nú haldi serliga at Gimpurin og Skitni Kartni vóru í topp. So høvdu vit ikki verið stødd´í kjallaranum hevði takið nokk lyft seg oman av.

200 royna eisini at provokera. Og tað rakar sikkurt onkran meint,men alíkavæl haldi eg at tað er uppá sítt pláss at onker, enn í dag spyr seg sjálvan og onnur um tað rætta (ella skeiva) í tí sum politikkarar og makthavarar siga og gera, ikki minnst á tí moralska frontinum, har Jenis og aðrir sokallaðir andspersónar fáa teiggi. Tað sum hóast alt er gott við bæði 200 og Jenisi er at teir báðir tora at hava eina meining og at teir báðir tora at seta sítt navn undir hana.Og tað er flott í nútíðar Føroyum.

Stutt kann sigast um konsertina, at tað nokk bara er ROX 2004 sum kann sammetast við hesa. Eg haldi sjálvur at hetta var eitt tað besta konsertupplivilsi eg havi havt í ár.

Vertshúskjallarin er vælegnaður til slíkar konsertir um so er starvsfólkið kann koma ásamt um at tey flestu sum fara til eina konsert av hesum slag eru hampafólk. So kunnu tey læra seg at, tað er ein andsøgn í at hótta fólk við útblaking, tá tey flippa eitt sindur út, samstundis við at man alment gremur seg um hvussu keðiligt mentunarlívið í okkara høvuðstaði er.

Annars er at vóna at vit kunnu fá eitt sindur meira lív í tónleikalívið og ikki minnst at betra um spæliumstøðurnar hjá teimum ungu tónleikurum, sum í dag næstan bara hava Margarinfabrikkina og tað tónlistarliga fyritaksemið sum gongur fyri seg har,at dúva uppá.

Stutt sagt 48 pages og 200 skryktu teppið undan teim flestu sum leitaðu sær leiðina "Underground" farna leygarkvøld.

Til tey ið ikki funnu framvið »shit happens«. Men ver har næstu ferð.Ver við til at skapa framtíðina.



*Vertshúskjallarin er vælegnaður til slíkar konsertir um so er starvsfólkið kann koma ásamt um at tey flestu sum fara til eina konsert av hesum slag eru hampafólk*